# Ph.D. verja við Fróðskaparsetur Føroya

Fríggjadagin 6. juni fer Jóannes Djurhuus at verja Ph.D. ritgerð sína í kolvetnisrelateraðari jarðalisfrøði *Analytical investigation of in-situ stresses and hydraulic induced borehole fracture.* Í ritgerðini hevur Jóannes ment algildugar støddfrøðisligar fyrimyndir ("modell") av spenninum í gróti kring borihol. Grundarlagið fyri fyrimyndunum eru veggja rivur, ið standast av, at boriruna verður trýst niður í boriholið. Vanliga eru stødd og rætningur av grótspenninum ókend, men eru tey avgerandi fyri, hvussu sterkur borihols veggurin er. Vitan um grótspennið hevur stóran týdning, tá ið verkfrøðingarnir fyrireika nýggjar kolvetnisbrunnar. Grótspennið kann eisini siga um hvussu sjálv boringin skal fara fram og hvønn veg og hvussu langt borast skal.

Sum eina roynd hevur Jóannes nýtt mátingar frá Snorre-kolvetnisøkinum í Norðsjónum, og við góðum úrslitum lýst grótspennið í økinum. Fyrimyndirnar av grótspenninum eru ikki knýttar at ávísum kolvetnisbrunnum, og kunnu tí einsvæl nýtast á Føroyaleiðini.

Arbeiðið við verkætlanini er farið fram á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum í samarbeiði við Høgskolen í Stavanger, við vegleiðing av Bernt S. Aadnøy, professara.

Tað var oljusamtakið Atlantic Margin Group (AMG), sum lat fíggingina til verkætlanina. Í AMG bólkinum vóru oljufeløgini Statoil, Enterprise og Mobil.

Í dómsnevndini hava sitið John Sebastian Bell, Ph.D., chief scientist hjá Sigma H. Consultants í Kanada, Arild Saasen, Ph.D., serfrøðingur frá Statoil í Noregi og Per Amund Amundsen, professari, Dr.Philos frá Høgskolen í Stavanger, Noreg.

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo

## Tøkk



*Í sambandi við 65 ára føðingardag mín vil eg takka hjartaliga fyri vitjan bæði innan- og uttanlendis frá, fyri gávur, blómur, fjarrit og uppringingar.*

*Takk til tykkum øll, sum hjálptu til og sum á ymiskan hátt gjørdu mær dagin hátíðarligan.*

***Jákup Olsen, Vágur***

## Tøkk



*Ein hjartans tøkk til øll tykkum, ið heiðraðu meg á 100 ára degnum tann 28. mai við blómum, gávum, fjarritum og køkum og gjørdu mær, saman við familjuni, dagin so hugnaligan!*

*Ein serstøk tøkk til Lágargarð, tað verið seg bæði á Miðstovuni, køkurin, leiðslan seinast, men ikki minst, tykkum, ið borðreiddu.*

*Enn einaferð stóra tøkk.*

***Margretha Egholm***




# Bilpakkar Summarsiglingin 2003

**Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

**Tórshavn - Bergen ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

**Tórshavn - Lerwick ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

**Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin**

| Lágárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstíð | Couchette | 4-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 4-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað innv. | 3-koyggju-kamar v. wc/bað útv. | 2-koyggju-kamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Bronckgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




Atli Dam um leiklutin hjá løgmanni:

# Sleppur ov lætt

**– Løgmaður átti ikki at givið pørtunum boð umvegis fjølmiðlarnar, men hann skuldi havt kallað teir saman og givið teimum eina ordiliga yvirháling, soleiðis at teir settu seg at finna eina semju, sigur Atli Dam, fyrrverandi løgmaður**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Tá løgmaður í fjølmiðlunum boðaði frá, at landsstýrið og samgongan ikki ætla at kalla tingið saman, so var hetta ikki ein útmelding, sum frøddi øllum. Fleiri halda óivað, at politiski myndugleikin eigur at leggja upp í, men fyrrverandi løgmaðurin, Atli Dam, heldur, at Anfinn Kallsberg skuldi farið til partarnar beinleiðis og ikki umvegis fjølmiðlarnar.

– Løgmaður átti ikki at givið pørtunum boð umvegis fjølmiðlarnar, men hann skuldi havt kallað teir saman og givið teimum eina ordiliga yvirháling, soleiðis at teir settu seg at finna eina semju, sigur ein avgjørdur Atli Dam.

Maðurin, ið longst av øllum hevur verið Føroya løgmaður, sigur við hesum, at Anfinn Kallsberg sleppur ov tíðliga.

– Tað er alla æru vert, at løgmaður og landsstýrið virða rættin hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at finna eina semju, men nú hevur verkfallið vart so leingi, at løgmaður má kalla partarnar saman, sigur Atli Dam.

Vit fáa ikki Atla Dam at siga, at løgtingið eigur ella ikki eigur at leggja uppí. Men Atli Dam heldur, at løgmaður fer ov leyst við bara at tosa umvegis fjølmiðlar, tí verkfallið hevur sett so stór spor og vart so leingi, at neyðugt er at fara meira aktivt inn í málið.

Og tað er fatanin hjá fyrrverandi løgmanninum, at Løgtingið ikki bara skal leggja upp í fyri at leggja uppí.

– Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu røkja sína skyldu. Tað tykist sum um, at partarnir – og serliga arbeiðsgevararnir – bíða eftir, at løgtingið leggur uppí. Men hetta skulu teir ikki gera. Teir hava átikið sær eina ábyrgd, og hana kunnu teir ikki loypa frá, sigur Atli Dam.

### Ikki tað sama

Einaferð í áttatiárunum syrgdi Atli Dam og táverandi samgongan fyri, at løgtingið skar ígjøgnum og lóggav um nýggjar sáttmálar.

– Støðan tá var ein heilt onnur. Tá samráddust feløgini ikki saman. Havnar Arbeiðsmannafelag legði stóran dent á eftirløn og Føroya Arbeiðarafelag legði ikki dent á hetta, og støðan gjørdist so kompleks, at tað tóktist ikki at gerast nakar enda á, og tí skil var neyðugt hjá løgtinginum at skera ígjøgnum, sigur Atli Dam.

Støðan tá og nú eru hvør sínar, heldur Atli Dam uppá. Tað, at øll arbeiðarafeløgini samráðast saman, skuldi gjørt tað munandi greiðari og léttari at samráðast.

### Hava uppiborið

Skulu vit tveita Atla Dam í bólk við arbeisgevarunum ella arbeiðarafeløgunum, so má hann bólkast við arbeiðarafeløgunum.

Hann tekur fult undir við Hans Joensen, formanni í Havnar Arbeiðsmannafelag, tá hann sigur, at gjógvin millum tey ófaklærdu og hini ikki má veksa, og tí skil er neyðugt við einum størri lønarvøkstri, enn arbeiðsgevararnir vilja vita av.

Støðið til hesar samráðingarnar finna vit fyri tveimum árum síðani, sigur Atli. Tá fingu feløgini stóran lønarvøkstur og onnur feløg hava eisini merkt stóran lønarvøkstur. Atli Dam kallar hetta sálarligu bakgrundina, og hann skilur ógvuliga væl, at arbeiðarafeløgini ikki vilja gerast verri fyri í samfelagnum.

Atli Dam heldur tað vera átaluvert, at arbeiðsgevararnir ikki hava flutt seg longur, og verkfallið nú snýr seg um undir eina krónu fyri hvønn tíma.



*Partarnir á arbeiðsmarknaðinum troyngja til eina ordiliga yvirháling, sigur fyrrverandi løgmaðurin, Atli Dam*

– Tað er eisini burturvið, at arbeiðsgevararnir kalla til fund við teirri treyt, at tað skal vera innanfyri eitt mark hjá teimum. Tá roynir mann ikki eftir einari semju, sigur Atli Dam.

### Ov nógv propaganda

Hesin seinasti mánaðurin við verkfalli hevur givið nógv pláss í bløðum og loftmiðlum til fakfelagstopparnar. Men hetta hevur ikki alt verið líka hugnaligt, heldur Atli Dam, og stórur tørvur er á góðum statiskum tilfari.

– Tað er alt ov nógv propaganda. Partarnir sita bara og skjóta aftur og fram eftir hvørjum øðrum við hvør sínum tilfari, sigur Atli Dam.

– Hetta hoyrir ongastaðni heima, sigur fyrrverandi løgmaðurin, sum heldur verkfallið hava vart leingi nokk, og tíðin er komin til at semjast.

# Strandingar hava lagt seg í seðlarnar

**- Hóast tíðin er knøpp, fara vit at gera alt, vit megna fyri at fáa eina góða stevnu, sum verður meira enn ketshup, pylsur og tombola, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum er í nevndini, ið fyrireikar Fjarðastevnuna**



*Á fyrsta sinni fara strandingar at skipa fyri eini stevnu, har kappróðurin telur við í FM-kappingini. - Vit hava lagt okkum í seðlarnar, og øll bygdir stendur aftanfyri stevnuna, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum er í nevndini, ið fyrireikar Fjarðastevnuna*

FJARÐASTEVNAN
*Vilmund Jacobsen*

Vikuskiftið, 13-15. juni, verður fyrsta stevnan nakrantíð á vestara armi á Skálafjørðinum, har kappróðurin telur við í FM-kappingini. Hetta er ein nýggj stevna, sum Róðrarsamband Føroya hevur samtykt at seta í verk. Stevnan verður annaðhvørt ár á vestara armi á Skálafjørðinum og annaðhvørt ár í Vestmanna. Væntandi fer stevnan at skifta ímillum Strendur og Skála, men ein møguleiki er eisini, at bygdirnar í framtíðini fara at skipa eitt felags stevnuøki, har stevnan verður hildin.

- Tíverri gjørdist tíðin knøpp, men vit hava lagt okkum í seðlarnar, og øll bygdin stendur aftanfyri stevnuna, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum er í nevndini, ið fyrireikar Fjarðastevnuna.

Hann sigur, at málið hjá strandingum er at skipa fyri eini góðari stevnu, sum er nógv meira umfatandi, enn vanligu bygdastevnurnar hava verið.

- Vit hava eftir førimuni roynt at gjørt okkum ómak og fara at skipa fyri nógvum og áhugaverdum tiltøkum. Vit vilja hava eina stevnu, sum í vavi er meira enn ketshup, pylsur og tombola, sigur hann.

Tað er ein fimmmannanevnd, sum vegna Stranda Ítróttarfelag og Stáluna hava ábyrgdina av stevnuni.

Nógv fólk hava, sum Jógvan Óli á Fríðriksmørk sigur, lagt seg í seðlarnar og ein teirra, sum hevur lagt nógva orku í fyrireikingarnar, er Virgar Nielsen, ið virkar sum eitt slag av formanni ella samskipara.

Stevnan á Strondum byrjar fríggjakvøldið, 13. juni, kl. 18, tá ið fyrstu tiltøkini verða á skránni. Lagt verður fyri við, at Bygdahúsið og Stálihølið lata upp. Kl. 19 fríggjakvøldið verður paintball skjótikapping á fótbóltsvøllinum, og hálvan tíma seinni verður barnasangkapping í Bygdahúsinum. Fríggjakvøldið endar við barnadiskoteki, sum eisini verður í Bygdahúsinum.

Leygardagin verður ein hópur av tiltøkum á skránni, og vit fara ikki at nevna tey øll í hesum umfarinum.

Dagurin byrjar við skrúðgongu úr skúlagarðinum og niðan til Bygdahúsið, har hornorkestur spælir og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum, setir stevnuna.

Hóast Jógvan Óli á Fríðriksmørk segði, at stevnan verður meira enn ketshup, pylsur og tombola, so verður hetta sjálvsagt eisini ein partur av Fjarðastevnuni.

Kappróðurin verður leygardagin kl. 15, og sum nevnt, telur hesin á fyrsta sinni við í FM-kappingini.

Kl. 16 verður møguleiki at koyra Go-Gart og mini-knallert á kaiøkinum við Viking Seafood, og somu tíð verður aftur paintball-skjótikapping á fótbóltsvøllinum.

Tivoli verður eisini við Bygdahúsið, og hesin parturin verður opin frá kl. 16 til midnátt.

Tey, ið hava áhuga fyri málningalist og handlist, hava eisini okkurt at fara til bæði leygardagin og sunnudagin.

Kl. 17.30 verður steypahandan á kaiøkinum við Vaðhorn, og her verður tað Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður, sum handar steypini.

Eitt forvitnisligt tiltak leygardagin verður frá kl. 18-21, tá ið útvaldir persónar, eitt nú prestar og listamálarar, fara at mála hvør sín málning. Hesir verða seldir á uppboði sunnukvøldið kl. 21.

Fjarða-teitið, har ymiskt er til skemtunar, verður eitt afturvendandi tiltak á stevnuni. Hetta verður sýnt fram í biohøllini í Bygdahúsinum, bæði leygardagin og sunnudagin. Fyrsta sýningin verður leygardagin kl. 19.

Børnini sleppa eisini at uppliva meira enn dans, tivoli og koyring av ymiskum slagi. Kl. 19 leygardagin fara Bobo & Fjotti at hava barnatiltak í Bygdahúsinum við gykli, gandakynstri og búktalara. Samstundis verður aftur barnadiskotek, sum varar til kl. 21.30.

Tey, ið vilja "pussa sær sálina", verða heldur ikki fyri vanbýti, tí leygarkvøldið kl. 21.30 hevur Missiónshúsið útimøti við Bygdahúsið og eftir møtið, eru øll vælkomin í Missiónshúsið til kaffi, køkur og hugna.

Leygarkvøldið kl. 22.15 verður kafé við livandi tónleiki, frásagnum, midnáttarrøðu og felagssangi í Bygdahúsinum - við eitt nú Ole Lauritsen, Tobba (Torbjørn Jacobsen) og Tummasi í Garði.

Á midnátt verður stevnudansur í Bygdahúsinum við Rok, har Signar úr Homrum spælir.

Sunnudagin verður eisini nógv á skránni, og dagurin byrjar við gudstænastu kl. 11, har Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikar, og kingosangarar luttaka.

Kl. 13 verður landskappingardystur í fótbólti í 3. deild, menn, millum Skála og TB, og kl. 15 verður landskappingardystur í 1. deild, menn, millum Skála og KÍ.

Eins og leygardagin, verður kafeteria, tivoli, Go-Gart, paintball og og annað á skránni sunnudagin.

Kl. 15 sunnudagin verður skemtirógving við Heygsstøð, og kl. 18 verður skemtifótbóltsdystur millum kvinnur av Strondum og Skála á hondbólts-vøllinum. Á hondbóltsvøllinum verður eisini ymiskt undirhald fyri børnum, eitt nú brotssparkskapping.

Kl. 19 verður áhugaverdur skemti-fótbóltur - ella ørvitiskapping, sum tað verður rópt - millum bygdaráðini á Strondum, Skála, Toftum og Gøtu á fótbóltsvøllinum.

Kl. 21 sunnukvøldið verður útimøti við Bygdahúsið, sum Keldan skipar fyri.